Sandoy Seafood 4 ár á baki:

Lyfti Sandoynna úr aldudalinum

Á Sandoy Seafood er nógv fiskaarbeiði, og virkið hevur keypt nógv meira fisk í ár enn í fjør. Seinastu vikuna hava tríggir trolarar landað á Sandi

Vilmund Jacobsen

Síðan Sandoy Seafood fór undir virksemi sítt í Sandoynni fyri fýra árum síðan, er oyggin lyft upp úr aftur aldudalinum; svartskygni er vent til bjartskygni. 110-120 fólk arbeiða á virkjunum á Sandi og í Skopun

Mynd: Jens Kr. Vang

Fyrst í nítiárunum, tá ið samfelagskreppan legði sína køldu hond yvir føroyska samfelagið, vóru flakavirkini í Sandoynni millum tey mongu, sum bukkaðu undir. Men í dag er vent í holuni. Fyri fýra árum síðan lótu virkini uppaftur undir navninum, Sandoy Seafood, og árini síðan hava meira enn 100 fólk verið til arbeiðis á virkjunum á Sandi og í Skopun. Tá ið fólk tjena pengar, kemur meira í kommunukassarnar, og meira verður keypt. Tað lítla bygdasamfelagið fer aftur at blóma. Og soleiðis hevur verið í Sandoynni seinastu árini. Sandoyggin er lyft upp úr aftur aldudalinum, og svartskygni er vent til bjartskygni.

Arbeiða hvønn dag

Jóan Petur Vest sigur, at tey 110-120 fólkini, sum starvast hjá Sandoy Seafood á Sandi og í Skopun, hava úr at gera, og soleiðis hevur verið alt hetta árið. Samlaðu ráfiskanøgdirnar í ár eru eisini munandi størri enn seinasta ár.

Á Sandi arbeiða tey saltfisk, og í Skopun verður fiskurin skorin til flak. Eini 40-50 fólk eru til arbeiðis á Sandi og eini 70 í Skopun. Allur fiskurin, sum Sandoy Seafood keypir um bryggjukantin, verður landaður á Sandi. Fiskurin, sum felagið keypir á uppboðsølu, kemur í bili um Skopunarfjørð.

– Toskurin, tann stóri upsin og nakað av longu verður saltað á Sandi, meðan restin verður skorin til flak í Skopun. Virkið á Sandi er eitt saltfiskavirki burtur av.

Jóan Petur sigur, at Sandoy Seafood serliga hevur lagt seg eftir at keypa tosk, upsa, hýsu og longu.

– Hava skipini onnur fiskasløg, eitt nú kongafisk og havtasku, selja skipini tey til onnur virki. Eru nøgdirnar smáar, kemur fyri, at vit keypa og selja fiskin víðari til aðrar.

Hann sigur, at best hevur loyst seg at saltað toskin, meðan upsin hevur verið eitt ískoyti, men toskurin er dýrur at keypa, so marginalarnir eru smáir.

Tríggir trolarar seinastu vikuna

Seinastu vikuna hava tríggir trolarar landað á Sandi.

Kolumbus og Nornagestur vóru inni mánadagin við 140.000 pundum tilsamans, og hósdagin í síðstu viku var Eysturbúgvin inni við 200.000 pundum. Meginparturin av veiðini hjá Kolumbusi og Nornagesti var upsi. Teir høvdu eisini nøkur tons av kongafiski og havtasku, sum aðrir keyptu. Tað nógva av veiðini hjá Eysturbúgvanum var eisini upsi. Sum skilst, fiska trolararnir ikki nógvan tosk í løtuni.

Spurdur, um tey vænta nakað skip aftrat hesa vikuna, sigur Jóan Petur, at Eysturbúgvin kemur innaftur ein av fyrstu døgunum, helst seinni í hesi vikuni.

Sandoy Seafood keypir veiðina hjá Kolumbusi, Nornagesti og Eysturbúgvanum at kalla hvørja ferð, men hetta er í kapping við onnur virki.

– Umframt tær nøgdir, vit keypa um bryggjukantin, keypa vit eisini nógvan fisk á uppboðssølu, og í seinastuni hevur tað serliga verið upsi. Hetta ger, at vit kunnu arbeiða hvønn dag, bæði á Sandi og í Skopun. Er onkur hendinga dagur, har einki er at flekja á Sandi, verður pakkað, sigur Jóan Petur.

Viðrar illa hjá útróðrinum

Nakað av útróðri er á Sandi, og sum skilst, fáa bátarnir eitt sindur av fiski, tá tað viðrar. Men hetta er ring ársins tíð til veður, og veðrið má ráða sær.

– Einir 2-3 bátar royna við línu og nakrir við snellu. Teir hava fingið toluligt, tá ið teir hava verið úti. Men tað viðrar illa, og ringt er í sjónum. Vit keypa allan útróðrarfiskin hjá bátunum á Sandi, sigur Jóan Petur Vest at enda.

Stjóri á Sandoy Seafood er tvørámaðurin, Magnus Jespersen og virkisleiðari er Martin Olsen úr Havn. Martin er virkisleiðari bæði í Skopun og á Sandi.

Norðís Seafood, Eiði:

Hýsuvirkið arbeiðir upsa, tí hýsan fer óvirkað av landinum

Norðís Seafood á Eiði varð serliga keypt til virking av hýsu. Tí fór virkið fyri góðum ári síðan eisini undir at roykja hýsu, og tað gera tey enn. - Men alt broytist. Nú verður fiskurin koyrdur til dyrnar, fiskasløgini eru ikki tey somu, og fiskurin er nógv smærri, enn hann hevur verið. Vit plagdu at rokna hýsusesongina hjá virkinum at vera frá august til apríl, men nú november mánaðin er umliðin, arbeiða vit næstan bara upsa, samstundis sum hýsan fer óvirkað av landinum, siga tey á Eiði

Vilmund Jacobsen

Í dag er minni vanligt at síggja skip landa á Eiði, enn tað onkuntíð hevur verið. Tað merkir tó ikki, at Norðís Seafood liggur í fiskaloysi. Virkið keypir meginpartin av ráfiskinum á uppboðssøluni á Toftum og frá P/F Beta í Saltangará. Hetta riggar eftir øllum at døma væl, tí á Eiði siga tey, at tey hugsa slett ikki um koyringina longur. Koyringin gongur heldur ikki útyvir fiskin, tí hann er í kassum allan vegin.

– Vit landaðu bátarnar her norðuri, men tað gera vit sjáldan longur, tí tú kanst ikki binda fólk og bjóða teimum ein arbeiðsdag um vikuna ella um mánaðin. Til tess er eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi ov stórur. Tí er tað heldur ikki lætt at fáa fólk at landa.

Á Eiði eru tey væl nøgd við tænastuna, tey fáa á Fiskamarknaði Føroya og hjá P/F Beta, sum hevur átta bátar og stóran og góðan bygning til fiskin.

– Hetta er góð leveransa, siga tey.

Tey siga, at t.d. P/F Beta ger tað møguligt hjá teimum smærru virkjunum at yvirliva, tí her kanst tú keypa tær nøgdir, tú hevur fyri neyðini.

– Alternativið kundi jú verið, at tú keypir fiskin frá tveimum partrolarum – einum »pari« – sum kanska hevur 200.000 pund, og tað er ein ov stórur biti at gloypa í okkara verð. Hetta er tískil ein nógv høgligari máti, enn um fiskurin varð landaður um bryggjukantin á Eiði.

Arbeiða mest upsa

Tá ið klaksvíkingarnir, Jóhan Páll og Hans David, saman við øðrum keyptu virkið á Eiði, varð dentur í fyrsta lagi lagdur á at keypa og virka hýsu, og fyri góðum ári síðan byrjaði Norðís eisini at roykja hýsu.

– Vit eru til arbeiðis hvønn dag á virkinum, men tað, vit arbeiða, er mest at kalla bara upsi. Síðan summarfrítíðina, sum var í tríggjar vikur fram til hálvan august, hevur bara verið turt gólv ein ella tveir dagar tilsamans. Hesa tíðina hava vit serliga arbeitt upsa, men hetta hevur ikki verið vanligt hesa tíðina av árinum. Orsøkin er, at næstan øll hýsan er farin óvirkað av landinum í hesum tíðarskeiði, serliga tann stóra hýsan.

Á Eiði siga tey, at hýsusesongin hjá virkinum vanliga hevur verið roknað frá august til apríl, men soleiðis hevur ikki verið í ár, nú november mánaði er umliðin.

– Ikki tí; bátarnir fáa nógva hýsu, men sum nevnt, kemur bert ein lítil partur til virkingar á landi.

Mai, juni og juli verður ikki roknað sum hýsutíð. Haraftrat plaga línubátarnir at fara út á djúpt vatn at royna um summarið. Aðrir pussa bátarnar upp, og at enda er hýsan vanliga verri fyri um summarið, samstundis sum lýggjari er í veðrinum, og fiskurin blotnar skjótari.

Nógv er til, men fiskurin er smáur

Á Eiði siga tey, at bæði hýsan og upsin eru smærri, enn tey hava verið í fleiri ár.

Í síðstu viku greiddi ein av okkara royndastu virkisleiðarum, Jason Johannesen frá, at upsin er nógv smærri í ár enn í fjør.

– Her norðuri eru vit púra samd. Upsin er smærri, og hýsan er eisini so nógv smærri, enn hon hevur verið. Vit plagdu at siga, at 60-70% av hýsuni vigaði meira enn 1 kg., men í dag viga 60% av hýsuni minni enn eitt kg.

Menn plaga at halda tað vera gott tekin, tá ið nógv er til av smáum fiski, so vónandi verður tað so við upsanum og hýsuni.

– Skal tað loysa seg at arbeiða upsa, er neyðugt, at nógv fer ígjøgnum maskinurnar, men her hjá okkum er orkan ikki so stór. Vit noyðast tó, sum allir aðrir, at liva við tí, sum er.

– Alt broytist. Nú verður fiskurin koyrdur til dyrnar, høvuðsfiskaslagið er ikki tað sama, sum síðsta heyst, og fiskurin er nógv smærri, enn hann hevur verið. Hesa tíðina av árinum plagdi hýsan at vera álitið, men soleiðis er ikki í ár, og tað er ein stór broyting hjá okkum.

Samstarv millum virkir

ÁEiði arbeiða tey ikki nógvan tosk. Virkið samstarvar við Sammut í Klaksvík, sum Jóhan Páll og Johan David eisini eiga og við Vestfis í Sørvági, har Vesturvón er høvuðseigari. Áhesum báðum virkjunum arbeiða tey serliga tosk og nakað av upsa.

Norðís Seafood hevur higartil í ár tikið ímóti 2400-2500 tonsum av ráfiski, og tað er væl meira enn í fjør.

55-60 fólk arbeiða á virkinum. Tey flestu eru av Eiði, men nøkur eru eisini úr grannabygdunum.

Vit hava aldrin verið so hart kroyst sum nú

– Hesin óskikkur, ið hevur tikið seg upp seinasta árið, at ósemjur á arbeiðsmarknaðinum verða lagdar fyri fútarættin í heilum, má steðgast, sigur Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag

ARBEIÐSMARKNAÐUR

Áki Bertholdsen

Fakfeløgini eiga at leggja alt annað til víks fyri at fáa steðgað hesum óskilinum, sigur Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag. Karl Johansen í Havnar Arbeiðsmannafelag sigur, at nú er tað ein spurningur um, hvat sáttmálarnir eru verdir

– Fakfeløgini hava ongantíð verið so hart kroyst, sum tey eru nú.

Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag, er alt annað enn nøgd við gongdina hetta seinasta árið.

Tað, henni als ikki dámar, er, at nú tykist tað at vinda upp á seg, at tá ið ósemjur á arbeiðsmarknaðinum stinga seg upp, verða málini løgd fyri fútarættin.

Tað er hent nakrar ferðir hetta seinasta árið. Feskasta dømi, er, at Fíggjarmálastýrið legði ósemjuna við Havnar Arbeiðsmannafelag um portørarnar fyri fútarættin og tað endaði við, at rætturin kom til ta niðurstøðu, at verkfallið var ólógligt og dømdi tískil portørarnar aftur til arbeiðis.

Hetta eru fakfeløgini sera misnøgd við. Eisini formaðurin í landsins størsta fakfelag, Ingeborg Vinther í Føroya Arbeiðarafelag hevur tikið hetta illa upp.

– Tað, sum hevur tikið serliga fast, er, at fútarætturin hevur als ikki viðgjørt, um sáttmálin er brotin ella ikki. Hann ger bara tann úrskurð, at friðarskyldan er brotin og dømir eftir tí. Rætturin hevur ikki hugsað um, at hevur arbeiðsgevarin brotið sáttmálan, er tað hann, sum hevur brotið friðarskyldina og ikki fakfelagið, tí at tað heldur fast um sáttmálan.

Sníkjandi arbeiðsrættur

Ingeborg Vinther heldur, at tað líkist ongum, at fútarætturin nú er farin at lata seg brúka til at ganga ørindi fyri arbeiðsgevaran, tá ið trætur taka seg upp a arbeiðsmarknaðin.

– Somuleiðis er ta átaluvert, at landsstýrið skal ganga á odda at føra nýggjar siðvenjur inn á okkum.

– Tað, sum hetta endar við, er, at so við og við verður fútarætturin til ein veruligan arbeiðsrætt í Føroyum. Og soleiðis fær landsstýrið í veruleikanum sníkt inn á okkum arbeiðsrættin, sum fakfeløgini annars eru samd at tey ikki vilja vita av.

Formaðurin í Føroya Arbeiðarafelag sigur, at tí má hgesin ólevnaðurin steðgast sum sjótast, áðrenn tað verður rættarsiðvenja í Føroyum.

Hon er vís í, at nú almenni arbeiðsgevarin er farin at brúka fútarættin, verður tað ikki leingi, til privati arbeiðsgevarin fylgjer eftir.

IngeborgVinther sigur, at hetta er eitt mál, sum fakfeløgini mugu taka í allarstørsta álvara.

– Vit mugu leggja allar aðrar ósemjur til víks og sta okkum í felag at viðgera, hvussu vit fáa steðga hesum óskilinum, tí tað er alt umráðandi, sigur Ingeborg Vinther.

– Støðan nú er tann, at fakfeløgini eru so illa fjøtra nú, sum tey ongantíð hava verið fyrr, og sleppur hetta at halda fram, verður tað skjótt, at tað als ikki ber til at føra fakfelagspolitikk longur.

Sera óheppið

Eisini Karl Johansen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag, heldur, at støðan, sum hevur tikið seg upp, er stak óheppin.

– Fútarætturin viðgjørdi als ikki mannin sum so. Hann kom bara til ta niðurstøðu, at verkfallið var ólógligt.

Hann sigur, at hetta máar av álvara støðið undan sáttmálunum og spurningurin er nú, hvat teir eru verdir.

Hann heldur, at fakfeløgini møguliga eiga at taka málið upp. Men hann heldur eisini, at málið er líka nógv politiskt, tí tað eru politikarar, sum brúka fútarættin.

Strandingar verða dýrir í drift næsta ár

Strandingar skulu betala meiri í skatti næsta ár, men teir skulu eisini fáa nakað fyri pengarnar, sigur Eivind Jacobsen, borgarstjóri

STRENDUR

Áki Bertholdsen

Strandingar verða dýrir í drift næsta ár.

Bygdaráðið hevur havt fíggjarætlanina fyri 2002 til viðgerðar og tað er greitt, at Sjóvar Kommuna ætlar sær at brúka nógv meiri pening næsta ár, enn hon plagar at brúka.

Samanlagt javnvigar fíggjarætlanin hjá Sjóvar Kommunu fyri komandi ár við 18.350.000 krónum og tað er næstan fýra milliónir meiri enn fíggjarlógin í ár javnvigar við.

Men fyri at fáa ráð til at hava so stóra nýtslu, hevur bygdaráðið eisini gjørt av at hækka skattaprosentið næsta ár eitt prosent, upp í 18%. Í løtuni er kommunuskatturin 17%.

Men afturfyri at taka við aðrari hondini, lorar Bygdaráðið eitt sindur aftur við hinari hondini, tí samstundis er tað greitt, at barnafrádrátturin hækkar 500 krónur næsta ár, upp í 3.000 krónur.

– Alt hetta, og so tað, at tað er meiri arbeiði, ger, at tað streymar so nógvur skattur inn í kommunukassan á Strondum, at bygdaráðið fekk at kalla øll síni ynski uppfylt fyri næsta ár, sigur Eivind Jacobsen, borgarstjóri á Strondum.

Stórar útbyggingar

Borgarstjórin á Strondum sigur, at nú bygdaráðið hevur lagt fíggjarætlan fyri komandi ár, er grundhugsanin, at borgarin er fegnari fyri at fáa nakað fyri pengarnar, heldur enn at sleppa eitt sindur bíligari í skatti.

– Vit halda, at tað er neyðugt, at Sjóvar Kommuna verður før fyri at veita borgarunum somu sømdir sum aðrar kommunur veita sínum borgarum, men tað fáa vit ikki gjørt við einum skattaprosenti, sum liggur eini trý prosent lægri enn tað hjá grannakommununum. Tí er aðaltátturin hjá okkum, at vit skulu hava kommununa upp á sama støði, sum aðrar kommunur eru á.

Kommunurnar rundanum okkum hava hægri skattaprosent enn vit og tí hava vit gjørt av hækka okkara skattaprosent eisini. Men hóast vit hava hækkað tað upp í 18%, er tað framvegis lægri enn flest aðra staðni.

Men Eivind Jacobsen leggur samstundis dent á, at borgararnir skulu fáa nakað fyri peningin, teir betala meiri í skatti komandi ár.

Sjóvar kommuna kann byggja út fyri 3,5 milliónir og tann kvotan verður brúkt til fulnar komandi ár.

Og meginparturin av tí verður brúkt til vælferðartænastur.

– Vit hava sett tvær milliónir av til barnagarð næsta ár og 500.000 til eldrasambýli. Harumframt skal ein millión brúkast til at bøta um kloakkskipanina og vatnveitingina.

Borgarstjórin sigur, at ætlanin er bæði at byrja uppá eldrasambýlið og barnagarðin komandi ár.

Talan er um eitt eldrasambýli til eini 10 fólk.

Barnagarðurin verður væl størri.

– Vit ætla at gera ein barnagarð sum tekur eini 60 børn. Men vit hava frammaundan eina vælvirkandi dagrøkt, so væntandi vera tað ikki meiri enn eini 20-40 børn í barnagarðinum í fyrstu syftu. Men vit ætla avgjørt, at børnini í dagrøkt eisini skulu kunna brúka spælistovur og aðrar hentleikar í barnagarðinum.

Bygdaráðið fer nú undir at fyrireika at byggja báðar stovnarnar, at útvega grundstykki, tekningar, neyðug loyvi o.s.fr.

Raksturin hækkar 40%

Samstundis, sum íløgurnar hækka munandi, er tað eisini greitt, at raksturin hjá kommununi hækkar eini 40% næsta ár.

Men orsøkin til tað, er, at Bygdaráðið ætlar at asfaltera at kalla allar vegirnar í kommununi og tað kostar einar tvær milliónir.

Eivind Jacobsen sigur, at Sjóvar Kommuna er væl fyri nú. Kommunan skyldar ikki eitt oyra men eigur sjey milliónir á bók.

– Tað gevur okkum eitt gott grundstøðið at standa á, nú vit av álvara fara at byggja kommununa út, sigur hann.

Fíggjarlógin skal hava eina viðgerð í bygdaráðnum afturat, men hon er longu viðgjørd so nágreinliga, at borgarstjórin væntar, at tað verður ikki annað enn ein avgreiðsluspurningur.